


***Nr. 5*** ***28. februar 2021*** ***81. árg.***

# Tú ert í Guds bíðirúmi

*„Eftir Harranum bíða! Hav gott troyst, tak mót í hjarta og Harranum bíða!“ Sálm. 27,14.*

Gud gav fólki sínum eini áhugaverd boð: „Tríggjar ferðir um árið skulu allir menn tínir stíga fram fyri ásjón Harrans, Guds Ísraels. Tí eg skal reka fólkasløgini burtur fyri tær og rúmka land títt, og eingin skal tráa eftir landi tínum, meðan tú, tríggjar ferðir um árið, fert at stíga fram fyri ásjón Harrans Guds tíns.“ 2. Mós. 34,23–24.

Hugsa um hetta! Tríggjar ferðir um árið skuldu teir steðga við øllum arbeiði og brúka tíð saman við Gudi, tilbiðja hann, søkja leiðslu hansara og leiðina fyri framtíðina. Dugir tú at ímynda tær, hvat ið fór at henda, um tú gjørdi tað sama?

Gev tær far um orðini „rúmka land títt“. Staðin fyri at missa okkurt, so fært tú, og staðin fyri at tað gongur aftur á hond, fert tú at fáa framgongd. Gev tær eisini far um orðini „eg skal reka fólkasløgini burtur fyri tær“. Meðan tú tilbiður Gud og bíðar eftir honum, fer Harrin at stríða tínar bardagar. Og ein av mununum á tær og Gudi er, at tú ert í vanda fyri at tapa, men Hann hevur ongantíð tapt eitt stríð.

Gev tær harafturat far um orðini „eingin skal tráa eftir landi tínum“. Tað er ikki neyðugt hjá tær at stúra fyri kapping frá øðrum. Gud brúkar hesar „tríggjar ferðir um árið-pílagrímsferðina” at læra fólk sítt hesa grundreglu: „Um tú bíðar eftir mær í tilbiðjan, so arbeiði EG fyri teg.“

Orð hansara sigur: „Men tey, sum bíða eftir Harranum, fáa nýggja kraft, tey lyfta veingjunum sum ørnir; tey renna – og møðast ikki, tey ganga – og lúgvast ikki!“ Jes. 40,31 V.D.

Tú hevur sostatt tvinnar kostir í at velja: Halt á at stressa – ella gagnnýt Guds styrki og hansara virkisskrá (sum tær tørvar), meðan tú nýtir tíð saman við honum.

„*… et Ord til Dagen*“
*Effie Campbell* umsetti.

# Ábyrgdarleysur?

Tá ið Jesus var einsamallur við lærusveinunum á Oljufjallinum, spurdu teir hann: „Hvat er tekinið fyri komu tína – og tá veraldar endi verður?“

Teir spurdu ikki, UM Jesus fór at koma aftur – ella UM henda verð fór at fáa ein enda. Teir vóru longu tá púra sannførdir um, hvussu stríðið fór at verða. Tí spurdu teir: „Hvat er TEKINIÐ, sum vísir, at nú hendir tað?“

Fullfíggjaða svar Jesusar stendur í heilum trimum kapitlum: Matteus 24, Markus 13 og Lukas 21. Les hesar tríggjar kapitlarnar, har ógvisligu hendingarnar fara fram undan Jesu afturkomu og heimsins enda.

Í øllum kapitlunum nevnir Jesus eitt ávíst tekn, sum tað fyrsta teknið. Tað tykist ikki at vera so ógvisligt; men tað er heilt vist ómetaliga ógvisligt, tá ið Jesus nevnir tað tríggjar ferðir – enntá sum fyrsta teknið. Jesus svaraði:

Matteus 24,4: „Síggið til, at eingin villleiðir tykkum!“ V.D.

Markus 13,5: „Síggið til, at eingin villleiðir tykkum!“ V.D.

Lukas 21,8: „Síggið til, at tit verða ikki villleiddir!“ V.D.

Eg haldi, at vit mugu vera eyka vakin og biðjandi á hesum døgum. Annars verða vit villleidd!

Vit eru eitt ábyrgdarfult fólk. Vit vaska okkum, spritta og halda frástøðu. Tá ið vit prísa Gudi í kirkjum og samkomum halda vit frástøðu, meðan fólk í barrum og skeinkistovum sita og trunka seg saman. Vit hava verið so ábyrgdarfull, at vit lata okkara eldra ættarlið doyggja einsamøll. Ikki eitt síðsta farvæl og takk og eitt uggandi orð. Syrgiligt, at vit gerast so ábyrgdarfull, at vit gerast ábyrgdarleys.

Tríggjar ferðir sigur Jesus, at villleiðing er fyrsta og týðiligasta teknið, at Hann, Jesus, kemur aftur og heimsins endi verður.

Lat hesi Jesu orð søkka djúpt niður í títt hjarta: „Latið ongan villleiða tykkum! Síggið til, at tit verða ikki villleidd!“ Minst tí til hesi Jesu orð: „Vakið og biðið!“ Matt. 26,41.

Lat Samson vera okkara ræðandi dømi. Gud hevði kallað og salvað hann. Men hann gloymdi at vaka og biðja – og tað endaði við, at Dalila sveik og lumpaði hann.

*Effie Campbell* umsetti.

# Við Jesusi í bátinum eri eg tryggur mitt í storminum

*Svein Andersen*

*Lærusveinarnir róptu av ræðslu: „Hatta er eitt spøkilsi!“*
*So kom Hann gangandi eftir vatninum til teirra.*

Nú eru vit aftur har, mitt í einum sterkum og óvæntaðum stormi við aldum, sum skola um allan jarðarknøttin, og Jesus hvørki svevur í bátinum ella kemur gangandi á rygginum á koronualdunum … nei, Hann býr við trúnni í hjarta okkara. Hann er nærri enn okkara egni andadráttur, Hann elskar okkum hægri enn mamma okkara, og Hann biður meir fyri okkum enn nakar annar, ja, Hann livir fyri at ganga í forbøn fyri okkum!

Tørvar tær forbøn? Tú hevur Ein forbiðjara, sum situr við høgru hond á okkara himmalska Faðir! Tú og eg kunnu trygt leggja okkum niður at sova væl, uttan ótta ella stúran fyri morgindegnum, tí hann er longu í Hansara hond! Hann hevur givið einglum sínum boð um at verja øll tey, sum elska Hann, „tí einglum sínum boð Hann gevur teg at varða á øllum leiðum tínum“ (Sálm. 91,11). Hann hevur givið Heilaga Andanum boð um at ugga og leiða okkum, og Hann hevur sjálvur gjørt ein bústað til okkara í Himli! Óttast ikki longur, og ræðst ikki, allar tínar tíðir eru í hond Hansara, og allir dagar tínir vóru taldir, langt áðrenn nakar av teimum var til!

Tað er so frígerandi at leggja lív sítt í Harrans hendur, tá ið hav og aldur bróta, og vindurin skræðir í tann longu ruspaða koronujassin. Tað er frælsi at búgva í skugga Almáttugans og kunna syngja við sálmaskaldinum: „Hann er høli mítt, borg mín, Gud mín, sum á eg líti!“

Álvarsemi í dagsins heimsumfatandi støðu við „sótt, ið seg sníkir í myrkri“ gevur mongum eitt nýtt høvi at meta um lívið og finna inn aftur til tann sinnisfriðin, sum bara ein persónlig andaktsløta við Orðinum og bønini kann geva gerandisdegnum. Eitt roknskaparyvirlit yvir, hvussu eg tey seinastu 10 árini havi brúkt tíð og pengar, fer kanska at broyta fíggjarætlanina, um Harrin skuldi vælsigna okkum við nýggjum árum undan afturkomu síni.

So halda dagarnir fram í stormi eins og í sólskini. Eg byrji dagin við Jesusi og Orðinum úr Himli, eg takki og biði, eg vælsigni børn og barnabørn, og eg gevi fast til meinigheitina og missión. Hví? Tí Hann so ofta hevur givið mær meira náði, enn eg hevði uppiborið ella væntað, og tí at Hann elskaði meg – áðrenn eg kendi Hann!

*Effie Campbell* umsetti.

# Ævinleikin

Onkur hevur sagt, at longsta orðið í málinum er ævinleikin. Tá meintu tey ikki við, at hetta orðið hevði flestar bókstavir, men at tað er ringt at fata um okkurt, sum er so rúgvismikið, at tað ongantíð endar. Í 1970-árunum, tá ið veking var her í oyggjunum, varð henda myndin brúkt um ævinleikan:

Hugsa tær eitt berg, sum er líka stórt sum øll jørðin og úr „grótharðum“ tilfari. Túsunda hvørt ár kemur ein lítil smáfuglur og stríkur nevið eina ferð eftir eggini. Tá ið bergið er niðurslitið, er eitt sekund av ævinleikanum farið.

Nú á døgum brúka tey eitt átta-tal, sum liggur á liðini, sum eina ímynd um ævinleikan. Tí, um tú skalt skriva tað, so gongur tað runt og runt og hevur onga byrja og ongan enda.

*Effie Campbell.*

---

Ber ikki Harranum tínar trupulleikar, men ber honum tína lovprísan, tá steðgar hann á hjá tær.

*e.c.* ums.

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 28. febr. | Tekstur: | 1 Mós.39,1-6+19-23; 41,1a+14-43 | bíbliuorð: | Jes. 41,10c |
| 7. mars | Tekstur: | 1 Mós,42,1-29, 42,39-43,1-15+32-33; 44 og 45 | bíbliuorð: | Sl. 32,1 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74




*Nr. 6* *14. mars 2021* *81. árg.*

# Vegurin til Lívið

Eg lesi ongastaðni, at Jesus hevði nakran samanbrest við syndarar, skøkjur, ránsmenn, spitølsk, tollarar og fleiri. Hví? Tí Jesus kom at leita upp og frelsa tað, ið glatað var. (Luk. 19,10). Hesi fólk sóu sína glataðu støðu, og tey sóu, at Jesus var Vegurin til Lívið.

Harafturímóti hevði hann fleiri samanbrestir við teir religiøsu – teir skriftlærdu. Hví? Tí teir vóru so sjálvgóðir og sjálvrættvísir, at teir ikki sóu sín tørv á einum Frelsara. Teir høvdu nóg mikið í sær sjálvum og síni religión.

Um eitt sjúkt fólk sigur: „So skjótt eg verði frískur, skal eg fara til lækna!“ er tað kanska ein sálarlækna, viðkomandi hevur tørv á.

Jesus sigur í Luk. 5,31–32: „Ikki tarvast teimum frísku lækna, men teimum, ið ilt hava. Eg eri ikki komin at kalla rættvísar, men syndarar til umvendingar.“

Støðan hjá mongum fólkum mótvegis Gudi er henda: „Tá ið eg fyrst havi ruddað út og fingið skil á mínum lívi, eri sloppin av við ringar vanar og blivið eitt betri menniskja, skal eg gerast kristin.“

Gloym tað! Hatta er ein líka fjákut grundgeving sum tann hjá honum, ið vildi vera frískur, áðrenn hann fór til lækna.

Vegurin til Guds er at venda um til Kristus og at vilja ganga eina nýggja leið. Umvending er ein lívsstílur restina av okkara jarðarlívi. Jesus er enn sum áður Vegurin til Lívið.

*Effie Campbell* umsetti.

# Gírigur og sjálvgóður

Einaferð vóru tað ein tjúgukrónumynt og ein 200-krónuseðil. Tey vóru bæði tvey so ógvuliga slitin og nógv brúkt, so nú vórðu tey send aftur til bankan á „eftirløn“.

Tey komu at liggja lið um lið, og so fór 200-krónuseðilin at práta. „Eg havi upplivað mangt spennandi í mínum lívi,“ segði hann, „eg havi verið inni á teimum fínastu og dýrastu matstovunum, ja, einaferð var eg inni á einum kasino. Hvat hevur tú upplivað?“

„Eg havi verið inni í eini fólkakirkju, einari baptistakirkju og í einari hvítusunnukirkju,“ svaraði myntin.

„Ein kirkja, hvat er tað?“ spurdi seðilin undrandi.

Hatta var eitt líknilsi, og tú skilir, at tað skal siga okkum, at menniskjuni eru so natin, tá ið tað ræður um Guds ríkis sakir, at tey halda tað vera ivaleyst, um tey lata eina mynt niður í talvuna ella kirkjubússuna. Men tá ið tað ræður um tey sjálv at ogna sær ting og lutir, upplivingar og stuttleikar, tá eru seðlarnir leysir í mappuni.

Latið okkum hugsa um, hvussu dýr ein mannasál er, og at hon skal liva í allar ævir. Latið okkum tí ofra tað, vit kunnu, at rætta menniskjum gleðiboðini. Í Luk. 8,3 stendur: „Jóhanna, kona Kúsa, húsfúta Heródesar, og Súsanna og mangar aðrar, tænaðu teimum við tí, sum tær áttu.“

„Tann, sum sparsamliga sáar, skal eisini sparsamliga heysta; og tann, sum sáar við signingum, skal eisini heysta við signingum;… tí Gud elskar ein glaðan gevara.“ 2. Kor. 9,6–7.

*Effie Campbell.*

# Ov grunn umvending?

Ein dagin tosaði ein gomul trúgvandi kona við meg. „Hvussu ber tað til, at tey, sum hava reist seg upp og vitnað, brádliga blíva burtur og ikki síggjast aftur á møtunum? Man tað vera tí, at umvending teirra var ov grunn? Eg havi upplivað tvær vekingar, og tá kundi tú síggja fólk gráta um sína synd. Tey vóru í rættiligari syndaneyð. Tað sært tú ikki longur. Mjáur er vegurin, og trongt er portrið, ið førir til lívs. (Matt. 7, 13–14) Tá ið tú skalt skora teg inn gjøgnum tronga portrið – sum er sjálv

umvendingin – so ber ikki til at hava alt handa slag av dragsli við sær. Tí mást tú sleppa. Men tú fært so nógv meir. Hin ljósa strondin við eydnulandinum liggur fyri framman, og har bíðar Jesus, okkara Frelsari, og øll okkara kæru eftir okkum."

Eg helt fyri við hana, at tað mundi vera tí, at tey góvust at biðja, lesa í Bíbliuni og koma saman við Guds børnum. Tey festu ikki eygu síni á Jesus – og so gekk galið. Um vit skulu koma beint á mál, hvat er so at gera? Tað vil henda søgan siga okkum:

Børnini sótu inni í skúlastovuni og skrivaðu. So gjørdist brádliga so myrkt. Lærarin fór yvir og tendraði ljósið. Løtu seinni ringdi út. Tá børnini komu útum, sóu tey, at tað hevði kavað. Eitt fínt, hvítt teppi lá um allan skúlagarðin. Tá funnu tríggjar smágentur upp á eitt spæl. Tær skuldu ganga frá skúlatrappuni og yvir ímóti portrinum og vita, hvør teirra kundi gera eina snórabeina linju við sínum sporum.

Tvær teirra hugdu niður fyri føtur sínar og gjørdu sær ómak at stíga fót fyri fót so beint sum gjørligt. Men tá ið tær komu yvir til portrið og snaraðu sær á, sóu tær, at sporini hjá teimum snúðu sær higar og hagar, meðan sporini hjá teirri triðju vóru so snórabein. „Hvussu hevur tú borið teg at?" spurdu tær.

„Áðrenn eg fór til gongu, hugdi eg yvir á portrið. Hvørju megin portrið er ein stólpi, og uppi á stólpunum er ein rund kúla til pynt. Eg hugdi ongantíð niður á føtur mínar, men eg festi eyguni á aðra kúluna og hugdi alla tíðina stívt upp á hana, og so gekk eg."

Hatta er tað, vit skulu gera: Festa okkara eygu á Jesus. Tá koma vit snórabeint heim.

*Effie Campbell.*

# Halt á at biðja og trúgva

*„Biðið uttan íhald!" 1. Tess. 5,17.*

Gjøgnum alla lívstíð sína bað bretski evangelisturin George Müller (1805 – 1898) Gud um pengar at metta síni foreldraleysu fosturbørn á Ashley Down barnaheiminum. Gjøgnum øll hesi ár bleiv tað til 7,5 milliónir dollarar, í nútíðar peningi eru tað 113 milliónir dollarar. Hann helt ikki, at tú alment skuldi tosa um tín peningaliga tørv, men kortini hevði hann altíð nóg

mikið, so hann fekk goldið sínar handilsrokningar – av tí at tað tók Gud sær av á yvirnatúrligan hátt.

Men trúgvin hjá Mülleri varð roynd á annan hátt. Til dømis bað hann regluliga fyri fimm monnum, sum hann av hjarta ynskti at vinna fyri Kristus. Fyrsti maðurin gav Kristusi lív sítt eftir 5 árum, annar og triði eftir 10 árum og hin fjórði eftir 25 árum. Men soleiðis er tann persónurin, sum stríðist: Müller bað í heili 52 ár, áðrenn fimti maðurin vendi um!

Tað var veruliga so, at hesin maðurin játtaði trúgv sína á Kristus fáar mánaðir eftir, at Müller var farin til gravar. Vilt tú biðja um okkurt í 52 ár uttan at hóma eitt svar?

Tað eigur tú at gera, og tú skalt!

Müller plagdi at siga: „Gud gleðir seg, tá ið hann kann økja um trúnna hjá børnum sínum.“ Staðin fyri at vænta okkum royndir, áðrenn vit vinna ein sigur, ella at vænta okkum venjingar í at vera tolin, so áttu vit heldur at tikið ímóti teimum frá Gudi sum eitt amboð. Royndir, forðingar, tvørleikar og av og á ósigrar er føðin hjá sjálvari trúnni.

Um tú biður og spyrst Gud: „Vilt tú?“ Er svar hansara: „Eg vil!“ Sálmur 91,15 sigur: „Kallar hann á meg, eg honum svari, í neyðum eg hjá honum eri. Eg hann frelsi og veiti honum æru.“ Og í Jeremia 33,3 V. D. sigur Gud: „Rópa til Mín, og Eg skal svara tær, og Eg skal kunngera tær tað, ið stórt og ófatandi er, slíkt sum tú kennir ikki!“

So orðið til tín í dag er – halt á at biðja og trúgva.

*„… et Ord til Dagen“* - *Effie Campbell* umsetti.

---

Skrivað stendur í Orðt. 11,11, at **bønirnar hjá gudsóttandi fólkum fáa býin at blóma.** So latið okkum vera trúføst í bønini fyri landi okkara og øllum býum og bygdum, so at Gud verjir okkum. Latið okkum biðja: „Leið okkum ikki í freistingar - men frels okkum frá tí illa!“

*e.c.* ums.

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 14. mars | Tekstur: | Matt. 21,1-9 | bíbliuorð: | Matt. 21,5b |
| 21. mars | Tekstur: | Matt. 27,31b-51+54 | bíbliuorð: | Matt. 27,54c |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74